# Kappast í amboðsfimleiki

**FIMLEIKUR**

**Í morgin verður onnur av tilsamans trimum steypa-kappingum í amboðsfimleiki í Fimi í Havn**

Hilmar Jan Hansen

Á hvørjum ári eru tríggjar steypakappingar í amboðsfimleiki, har kappast verður í einum, tveimum ella trimum amboðum hvørja ferð. Um nýggj amboð koma við, verður sum oftast kappast fyrstu ferð í teimum í einari steypakapping.

Kappingin í morgin, sum verður í Fimi í Havn, er onnur av trimum, og hon koyrir líkasum í tveimum, tí gentur og smádreingir sleppa framat klokkan 11, men høllin er tøk til fyrireikandi venjing longu frá klokkan 9.

Tey eldru, sum eru kvinnur, menn, kvinnuunglingar, mansunglingar og dreingir, byrja at kappast klokkan 15, men sleppa fram at høllini tveir tímar áðrenn.

Hjá kvinnum verða amboðini hesa ferð lop og forskotin barr, og hjá monnum eru amboðini gólv, reck og paralell barr.

Tann fyrsta av steypakappingunum var 22. januar, og tann triðja og seinasta verður 19. februar.

hilmarjan@sosialurin.fo




*Onnur av trimum steypakappingum í amboðsfimleiki verður í Fimi í morgin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kvinnurnar til Malta

**FÓTBÓLTUR** **Um ein lítlan mánað skal kvinnulandsliðið í fótbólti spæla við í einari undankapping á Malta. Landsliðsvenjarin, Álvur Hansen, hevur tikið út 17 spælarar til uppgávuna**

Hilmar Jan Hansen

Talan er um eina undankapping, har fýra lið eru í einum bólki og besta liðið teirra millum kemur víðari til sjálva EM-undankappingina. Føroysku kvinnurnar eru í bólki saman við Armenia, Malta og Georgia, og kappingin á Malta verður í døgunum frá 1. til 9. mars.

– Vit hava vant miðvíst síðani hálvan november. Kvinnurnar hava verið samlaðar til venjing tríggjar ferðir um vikuna, og eg haldi, at formurin er á góðari leið nú, sigur landsliðsvenjarin, Álvur Hansen, við FSF-heimasíðuna.

Hann heldur kvinnulandsliðið hava góðar møguleikar í hesi kappingini: – Eg dugi ikki heilt at siga, hvørja styrki mótstøðuliðini hava, men um ein hyggur at úrslitunum hjá teimum, skuldu vit havt góðar møguleikar at klárað okkum væl í kappingini.

Teir 17 spælararnir, Álvur Hansen hevur tikið út til kappingina, eru Rannvá B. Andreasen, KÍ, Mona Breckmann, AB, Fríðrún Danielsen, Skála, Olga Kristina Hansen, AB, Sigrid Jacobsen, KÍ, Rakul M. Johannesen, B36, Sólvá Joensen, BK Skjold, Bjarta Ó. Johansen, HB, Malene Josephsen, KÍ, Margit Magnusdóttir, MB, Rakul V. Magnussen, Vejle BK, Paula Mikkelsen, KÍ, Ragna Patawary, KÍ, Ansy Sevdal, Víkingur, Heidi Sevdal, Víkingur, Randi S. Wardum, KÍ, og Anja Weyhe, B36.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Ikki so galið U21-lutakast

**FÓTBÓLTUR** **– Vit fingu tvey av londunum, vit ynsktu okkum, umframt at tað altíð er spennandi at møta Danmark, sigur annar av U21-landsliðsvenjarunum, Bill McLeod Jacobsen, eftir lutakastið í gjár til komandi EM-undankappingina**

Hilmar Jan Hansen

Báðir landsliðsvenjararnir, Bill McLeod Jacobsen og Heðin Askham, umframt FSF-aðalskrivarin, Virgar Hvidbro, vóru til staðar í Nyon í Schweiz, tá lutakastið til komandi EM-undankappingina hjá U21-landsliðnum var í gjár. Í undanfarnu kapping fingu U21-menninir 11 stig, so spenningurin var stórur, hvussu okkara bólkur hesa ferð fór at síggja út.

Tá avtornaði, fingu Føroyar úr teimum báðum niðastu bólkunum Makedonia og Norðurírland, áðrenn Danmark kom úr pottinum í næstovasta bólkinum. Í ovasta bólkinum vóru lond sum Ongland, Holland, Italia og Týskland, men tað endaði við, at Serbia kom í bólkin hjá Føroyum.

– Alt í alt haldi eg, at tað var fínasta slag. Makedonia passaði okkum væl og Norðurírland somuleiðis, og hetta vóru tvey av londunum, vit ynsktu okkum frammanundan. At vit so fingu Danmark, var fantastiskt, tí tað fer at geva okkum ein spennandi útidyst í onkrum av størru donsku býunum, umframt at tað verður stuttligt at spæla ímóti danskarunum í Føroyum, sigur Bill McLeod Jacobsen.

– Serbia er hinvegin eitt av londunum, ið kann verða nokk so torført at spæla ímóti, men tað er so frægari enn Rumenia ella okkurt av hinum londunum, vit kundu fingið. Vit hava so ikki spælt ímóti nøkrum av hesum londunum fyrr, sum vit skulu møta hesa ferð, so tað verður bara spennandi.

## Vilja longur upp

Beint eftir lutakastið fóru samráðingar í gongd um, hvussu skráin fyri bólkin skuldi síggja út, og hóast Føroyar ikki fingu øll síni ynski uppfylt, er tað kortini á einari góðari leið. Úrslitið gjørdist ein heimadystur og fýra útidystir í ár, men so afturfyri tríggir heimadystir næsta ár. Og útidystirnir ímóti Norðurírlandi og Serbia eru mestsum samstundis, sum A-landsliðið møtir somu tjóðum, so har ber til at samskipa ferðingina hjá landsliðunum báðum.

– Vit gleða okkum annars til at koma í gongd, og fegnast um, at vit í tveimum kappingum hava megnað at spælt okkum 10 pláss fram á styrkilistanum. Vit eru nú nummar 41 av teimum 53 limalondunum í UEFA, men ætla okkum víðari, sigur Bill McLeod Jacobsen.

– Sjálvandi er undanfarna kapping nógv at liva upp til hjá okkum, men vit fara at royna, um vit ikki kunnu vinna okkum longur upp á styrkilistanum. Koma vit upp í næstniðasta styrkibólkin, kunnu vit næstu ferð fáa eitt ella tvey mótstøðulið úr niðasta bólkinum, og tað er málið, vit ætla okkum at røkka við hesi komandi undankappingini.




*Eftir fráliku undankappingina hjá U21-landsliðnum, ið gav heili 11 stig, er málið nú at standa seg so væl í komandi EM-undankapping, at Føroyar kunnu koma ein bólk upp í styrkismetingini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**2011:**

| | |
|---|---|
| 31/05 | **FØROYAR** - Norðurírland |
| 10/08 | Norðurírland - **FØROYAR** |
| 06/09 | Serbia - **FØROYAR** |
| 07/10 | Danmark - **FØROYAR** |
| 11/11 | Makedonia - **FØROYAR** |

**2012:**

| | |
|---|---|
| 01/06 | **FØROYAR** - Makedonia |
| 05/06 | **FØROYAR** - Serbia |
| 15/08 | **FØROYAR** - Danmark |